# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt val og annað

Nú varð kortini ikki fólkatingsval. Fogh hevur gjørt av at bíða eitt sindur kortini. Tað hevði annars ikki komið sum nøkur politisk bumba, um val nú varð útskrivð í Danmark. Síðan nýggi flokkurin Ny alliance varð stovnaður, hevur prutlað undir politiska lokinum. Ein kann halda um Ny alliance, hvat ein vil, men hesin flokkur er so tann fyrsti, sum hevur megnað at hótt valdsmonopolið hjá danska Framburðsflokkinum. Aðalendamálið hjá Kader hevur verið at taka valdið frá Framburðsflokkinum, og nógv kundi bent á, at hetta fer at eydnast, tá avtornar. Fyri forsætisráðharran sjálvan kemur støðan ikki heilt illa við. Hann hevur, sum tann drivni taktikkarin, ið hann er, spælt sær góð kort upp í hondina. Semja er um risastóran skattalætta, breið semja er um um almenna sektorin, bert eitt lík, Irak, er í lastini og tyngstu sáttmálasamráðingar á privata arbeiðsmarknaðinum standa fyri fyrst í komandi ári. Sostatt er stjórnin væl fyri at leggja út í valstríð - um ikki alt fyri eitt, so helst seint í heyst ella tíðliga í vetur. Hvussu støðan er hjá andstøðuni er ein annar spurningur tó at alt bendir á eitt gott val fyri tey radikalu var val nú.

Um fólkatingsval varð útskrivað nú ella verður tað um stutta tíð, hvussu kemur tað so við hjá føroysku flokkunum. Eingin ivi er um, at eitt val í næstu framtíð kemur væl við hjá andstøðuni, sum fær eitt gott høvi at nýta hetta valstríðið sum eina aðalroynd til løgtingsvalið. Hinvegin er spurningurin, hvussu væl samgonguflokkarnir eru fyri. Eftir trý ár í sátt og semju og eisini við fleiri góðum samfelagsgagnligum úrslitum er samgongan komin í innanhýsis stríð. Hetta kann gerast ein meinbogi, tá og um fólkatingsval verður áðrenn eitt løgtingsval, men hetta nýtist ikki at gerast ein meinbogi. Tað velst alt um, hvussu taktiskir flokkarnir verða og um teir megna at leggja klandrið til viks í fólktingsvalstríðnum.

Eitt val og annað! Stóri spurningurin er, hvussu eitt fólkatingsval í hesum árinum fer at ávirka eitt møguligt løgtingsval í januar. Ymiskt hevur bent á, at løgmaður meira ella minni óviljaður fer at vera noyddur at útskriva val í ótíð. Stevið í samgonguni hevur ikki verið hitt besta síðan Laksáfoss byrjaði sín solosong og stevið tykist bert at versna.
Eitt val hevði ivaleyst reinsað luftina. Men nær skal tað verða, tað er spurningurin. Løgmaður hevur fingið nakað at hugsa um. Hann ger helst beint í at ráðleggja við samgonguna, áðrenn hann tekur sína avgerð, ein avgerð, ið verður alt annað enn lœtt m.a. tí, at enn standa stór og týðandi samgongumál í hálvum gekki – mál sum samfelagið ikki hevur ráð at hava liggjandi sum óloyst í mánaðir og ár. Og so er tað uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi. Vil løgmaður hava tað gjøgnumført skjótast ella vil hann, at tað skal bíða og út frá tí skriva út val í næstum?

**Sosialurin**

## Eitt valdømi tænir heildini



**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri

Í farnu viku legði tingformaðurin, Edmund Joensen, fram uppskot um Føroyar sum eitt valdømi. Eitt uppskot sum er bæði rætt og neyðugt.

Uppskotið er rætt, tí tað skapar eina valskipan, har allar atkvøður viga líka. Landafrøðiliga umboðanin í verandi valskipan er minni viðkomandi í dag, nú landið nærum alt er bundið saman, og virkar sum ein búskaparlig eind.

Skulu vit menna okkum sum nútímans samfelag er neyðugt at hugsa heildarliga – og fyrsta treytin fyri tí er eitt ting, sum arbeiðir fyri skilagóðari útbygging um alt landið og á øllum samfelagsøkjum.

Halda vit fram við verandi skipan, fer tað at tálma framburðinum, tí hugsað verður fyrst og fremst lokalt og ikki um heildina. Vit síggja alt ov ofta, at avgerðir mangan verða órationellar, og merktar av negtivari motivatión. Viðhvørt velur tingið heldur onki at gera, enn at gera nakað í miðstaðarøkinum, og ótald dømi eru um evni, sum ongatíð koma á dagskránna av somu orsøk. Ein landsplanur – ella skipað útbyggingarætlan í høvuðsheitum fyri alt landið - er bert eitt dømi.

Vit mugu koma burtur úr hugsanini um, at miðstaður og útjaðari eru mótsetningar. Pláss er fyri báðum, og landinum tørvar bæði. Landið hevur ikki ráð til, at vit hugsa um okkum sjálvi í mótsetningum. Eitt miðstaðarøki við framburði gevur fíggjarligan møguleika fyri struktureraðum útjaðarapolitikki. Heildarhugsan ger tað møguligt.

Tá Føroyar verða eitt valdømi, sleppa vit undan smákegli um smámál á tingi, bara fyri at onkur einstakur tingmaður kann markera seg í mun til onkran pinkalítlan part av valdømi sínum. - Og fólk eru alt annað enn býtt, tey gjøgnumskoða glantrileikin, og teimum leiðist við slíkt.

Enn eru nøkur tingfólk, sum ikki kunnu ella vilja síggja teir møguleikar og tær avbjóðingar, sum liggja í nýggju skipanini við einum valdømi, men neyðhalda í verandi skipan. Tað er oftast so, at mong ikki evna at síggja møguleikarnar í menningini, og tí eru ímóti øllum. Men hesi afturhaldsfólkini eru ofta skjót at taka broytingarnar til sín, tá bert onnur hava lagt rygg til at gjøgnumføra tær.

Tí er mín áheitan á framskygda meirilutan, sum eftir øllum at døma longu er á tingi: Latið ikki afturhaldskropparnar kúga tykkum, latið ikki henda møguleika detta tykkum av hondum, men skipið Føroyar sum eitt valdømi.

## Afturvísing av skuldsetingum í Dimmalætting 08.08.2007

**- um bókina hjá André Niclasen: FØROYA MÁL Á MANNA MUNNI – móðurmálið og málrøkt**



**ANDRÉ NICLASEN OG JAN MÜLLER**

Í bókini er eitt úrval av greinum og viðmerkingum, sum André Niclasen í tíðini 1992-98 skrivaði í Málteiginum í Sosialinum, umframt at okkurt eisini hevur staðið í Dimmalætting og í tíðarritinum Málting.

Í Dimmalætting 8. august 2007 hevur Páll Poulsen eitt lesarabræv undir yvirskrivtini: "Danskar duldir og andréskar skuldir", har Páll Poulsen pástendur, at André Niclasen bert hevur skrivað ein brøkpart av bókini. Tað mesta hevur André Niclasen tikið frá øðrum, skrivar Páll Poulsen.

Hetta er uttan hald í veruleikanum. André Niclasen hevur skrivað alla bókina, burtursæð frá einum brævi frá Heðini Brú, sum stendur sum uppískoyti aftast í bókini.

Hetta verður hervið váttað.

*Tórshavn 19.08.07*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.